UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **23. oktober 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-92**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 29/2020 eftir tingskipanini §52 a frá Honnu Jensen, løgtingskvinnu. Fyrispurningur um ljóðbøkur, settur landsstýrismanninum við uttanríkis- og mentamálum Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Verður arbeitt við eini tíðarhóskandi ljóðbókaskipan?
2. Um, ja, hvussu langt áleiðis er verkætlanin komin og nær væntast hon at vera tøk til borgaran at nýta?
3. Verða nóg nógvar føroyskar bøkur – bæði fagrar bókmentir, skúlabøkur og aðrar yrkisbókmentir - lisnar til ljóðbøkur?

Svar

Til 1 og 2: Ljóðbókatænastan á Landsbókasavninum er við at leggja síðstu hond á eina tíðarhóskandi ljóðbókaskipan, ið fer at verða tøk á netinum. Við skipanini er ætlanin, at bókasøvn kunnu lána út føroyskar ljóðbøkur til almenningin, og skipanin er eisini ætlað teimum, ið hava serligan tørv á ljóðbókum.

Ljóðbókatænastan hevur lagt nógva orku í arbeiðið við tøkniligum, upphavsrættarligum og avtalurættarligum viðurskiftum, ið eru knýtt at skipanini, umframt við skráseting, talgilding og umlegging av ljóðfílum til hóskandi netformat.

Nakað arbeiði er eftir, men miðað verður móti, at ljóðbókaútlánsskipanin á netinum verður tøk til várs. Hetta er tó treytað av, allar neyðugar avtalur við rættindahavarar eru komnar upp á plass tá.

Talan er um eina tráoynda skipan hjá donskum bókasøvnum, ment í Danmark, og sum bókasøvnini í øðrum norðurlondum eisini hava í hyggju at brúka framyvir. Skipanin hevur eisini tann fyrimunin, at føroyingar í Danmark fáa atgongd til allar knapt 500 ljóðbøkurnar, ið Ljóðbókatænastan hevur framleitt higartil. Arbeitt hevur verið í eina tíð við at fyrireika og laga skipanina til føroysk viðurskifti.

Til 3: Ljóðbókatænastan gav í 2019 43 ljóðbøkur út. Av hesum vóru 20 nýframleiddar ljóðbøkur og 23 ljóðbøkur, ið áður eru givnar út á kasettubondum. Útgávurnar fevndu um bøkur til børn og ung, fagrar bókmentir, skúlabøkur og yrkisbókmentir.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Nám miðar móti, at allar bøkur, ið tey geva út, eisini verða givnar út sum ljóðbøkur. Eisini onnur forløg geva út ljóðbøkur, men tað er fíggjarliga tungt at geva ljóðbøkur út, tí føroyski marknaðurin er so lítil.

Tá nýggja skipanin við ljóðbókum á netinum er komin í fasta legu, fær Ljóðbókatænastan brúkt størri part av játtanini til at framleiða ljóðbøkur.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður

Tinghúsvegur 5-7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ✉ ummr@ummr.fo • www.ummr.fo